Ruth Vang
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52 a

Fyrispurningur um biologiskt tilfar í samband við koronukanningar, settur landsstýrismanninum í heilsumálum, Kaj Leo Holm Johannesen (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)

1. Nær verður biologiska tilfarið burturbeint, sum verður tikið frá persónum í sambandi við kanningar av koronusmittu, sum verða bílagdar á korona.fo?
2. Verður tilfarið brúkt til annað enn at staðfesta, hvørt kannaði persónurin hevur koronusmittu?
3. Hevur landsstýrismaðurin avtalað mannagongdir við viðkomandi kanningarstovur í hesum sambandi?

Viðmerkingar:

Danskir miðlar hava varpað ljós á, at Statens Serum Institut goymir biologiskt tilfar frá royndunum, sum tiknar verða fyri at staðfesta koronu. DNA verður skrásett og goymt í óasetta tíð við gransking fyri eyga. Funnist hevur verið at, at viðkomandi persónar ikki í nøktandi mun eru gjørdir varugir við hetta. Serliga ivasom gerst støðan av, at Danmarks Radio nýliga hevur avdúkað, at blóðroyndir, sum Statens Serum Institut hevur tikið av donskum barnakonum í øðrum høpi verða nýttar í amerikanskari granskingarverkætlan, sum eitt nú gevur Facebookstovnaranum Mark Zuckerberg serrættindi, uttan at kvinnurnar á nakran hátt eru kunnaðar ella hava givið sína tilsøgn.

Vanliga fatanin millum fólk í Føroyum er, at tilfarið frá koronuroyndunum her heima verður burturbeint, og vit hava ikki havt orsøk til at óttast líknandi støður sum hesar nevndu. Men tað hevur ikki verið lagdur serligur dentur á kunning um júst hesi viðurskifti. Eitt nú hevur tað ikki eydnast undirritaðu at finna nakað á heimasíðuni korona.fo um, hvørt royndirnar verða burturbeindar. Tí verður spurningurin formliga settur landsstýrismanninum.

Á Løgtingi, 27. januar 2021

Ruth Vang